Bjarni Djurholm:

# Peningurin hevur ligið deyður

- Tað er positivt, at vit fáa gongd á arbeiði við virðisbrævamarknaðinum, tí vit mugu ásanna, at peningurin í stóran mun hevur ligið deyður, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum.

Bjarni Djurholm sigur, at nú verður stóra takið at fáa innarbeitt nakrar arbeiðsgongdir.

- Føroyingar eru vanir at seta pengar á bók. Harvið er peningurin deyður. Tað kemur kanska óvart á fólk, men kapitalur manglar ikki í Føroyum. Men vit mugu konstatera, at peningurin í stóran mun hevur ligið deyður, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum sigur, at ein ávís konservatisma hevur valdað í Føroyum hesum viðvíkjandi.

- Tað hevur nakað við hugburð at gera, og virðisbrævamarknaðurin er eitt stig á rættari leið, tí hann er alneyðugur, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum.



*Virðisbrævamarknaðurin fer at gera arbeiðsgongdirnar smidligari, og eg vil fegin ynskja Atlantic Petroleum tillukku, nú teir verða fyrsta felag, sum verður skrásett á virðisbrævamarknaðinum, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Løgmaður:

# Fullkomiliga nýggjur heimur

**Atlantic Petroleum verður nú sum fyrsta føroyska felag skrásett á íslendsk-føroyska virðisbrævamarknaðinum, og tað heldur Jóannes Eidesgaard vera eitt stórt framstig fyri føroyskt vinnulív**

VIRÐISBRÆVA-MARKNAÐUR
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

- Hetta er avgjørt eitt markamót fyri føroyingar og fyri føroyskt vinnulív. Tað eru tvær søguligar hendingar í hesum. Fyri tað fyrsta fáa vit ein føroyskan virðisbrævamarknað, sum gevur føroyskum feløgum og fyritøkum møguleika at skráseta seg og blíva virðismett. Og vit fáa við Atlantic Petroleum tað fyrsta føroyska felagið, sum skrásetir seg, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður, nú Atlantic Petroleum verður skrásett á íslendsk-føroyska virðisbrævamarknaðinum.



*- Mann tosar nógv um at einskilja fyritøkur. Nú hava vit so fingið virðisbrævamarknaðin. Tað at vit seta hol á eina einskiljing av almennum fyritøkum er sera áhugavert í hesum sambandi, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Ein nýggjur heimur

Løgmaður sigur, at hetta er eitt framstig í mun til tað, sum hevur verið galdandi á økinum áður, tí okkara fíggjarheimur hevur verið ógvuliga stirvin.

- Hetta er ein fullkomiliga nýggjur heimur, tá tað snýr seg um at umsita sínar ognir. Tað er nógvur deyður kapitalur í Føroyum, og hesin má gerast aktivur, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

### Serliga áhugavert júst nú

Jóannes Eidesgaard heldur, at hetta framstigið kemur í einum tíðarskeiði, sum er serliga áhugavert. Við einari søguligari lágari rentu átti tað at verið meira áhugavert fyri føroyskan kapital at sett peningin í virkin feløg, heldur enn at hava peningin standandi á bók, har avkastið er lítið vegna ta lágu rentuna.

### Tørvur á váðafúsum kapitali

- Hetta kemur at fáa stóran týdning fyri føroyskt vinnulív. Trupulleikin er váðafúsur kapitalur. Okkara fyritøkur her heima eru ofta lítlar og kapitalveikar í mun til fyritøkur úti í heimi. Virðisbrævamarknaðurin er eitt framstig í so máta, sigur løgmaður.

Jóannes Eidesgaard sigur, at virðisbrævamarknaðurin kemur í tøkum tíma, tí hetta er mátin, sum onnur norðurlendsk lond brúka.

# Atlantic Petroleum væl fyri

**Partapeningurin í partafelagnum Atlantic Petroleum er 74 milliónir krónur, og felagið hevur eitt virði upp á 111 milliónir krónur, nú felagið verður skrásett á virðisbrævamarknaðinum**

VIRÐISBRÆVA-MARKNAÐUR
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Í dag verður Atlantic Petroleum, sum føroyskar fyritøkur og privatpersónar fyri tað mesta eiga, skrásett á íslendsk-føroyska virðisbrævamarknaðinum sum fyrsta føroyska felagið. Felagið verður skrásett á íslendska virðisbrævamarknaðinum ICEX. Virðisbrævamarknaður Føroya er partur av ICEX.



*Skrásetingin fer at gera tað smidligari at økja um virksemi felagsins við tað, at atgongd til váðafúsan kapital gerst lættari, sigur Wilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Wilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum, sigur, at skrásetingin fer at víðka munandi um møguleikarnar fyri vøkstri. Aðalsetningurin hjá Atlantic Petroleum er at verða eitt veruligt oljufelag, sum luttekur í leiting og framleiðslu av olju.

- Skrásetingin fer at geva okkum øktar møguleikar at menna felagið soleiðis, at vit kunnu fylgja løgdu ætlan felagsins um at verða eitt virkið oljufelag, sum luttekur í leiting, útbygging og framleiðslu av olju oggassi geva eitt gott avkast til íleggjarnar, sigur Wilhelm Petersen, stjóri, í tíðindaskrivi.

### Lættari at keypa og selja

At Atlantic Petroleum verður skrásett á virðisbrævamarknaðinum merkir ítøkiligt, at partabrøv hjá felagnum kunnu keypast og seljast á hesum marknaði. Avleiðingin verður væntandi, at tað verður lættari hjá partaeigarum at selja og keypa, samstundis sum partabrøvini verða virðismett á virðisbrævamarknaðinum.

### Lættari atgongd til kapital

Wilhelm Petersen sigur, at felagið í longri tíð hevur arbeitt við hesi verkætlan.

- Nú komið er undir land, verður meir orka løgd í at náa øðrum settum málum, og verður skrásetingin eitt nýtt amboð, ið skal nýtast í hesum sambandi. Skrásetingin fer millum annað at gera tað smidligari at økja um virksemi felagsins við tað, at atgongd til váðafúsan kapital gerst lættari, sigur Wilhelm Petersen, stjóri.

Treytir fylgja við

Fyri at verða skrásett á virðisbrævamarknaðinum skal eitt felag, í hesum føri Atlantic Petroleum, lúka ávísum treytum. Týdningarmesti tátturin er, at Atlantic Petroleum skal syrgja fyri, at allir keyparar og seljarar hava somu upplýsingar um felagið. Hetta er fyri at tryggja, at gjøgnumskygni er so gott sum gjørligt, soleiðis at partaeigarar ikki keypa og selja á skeivum grundarlag. Atlantic Petroleum verður sum nevnt skrásett á ICEX í dag, og til ber at kunna seg um prísin á partabrøvum á heimasíðunum www.icex.is ella www.vmf.fo. Um tú vilt keypa partabrøv í felagnum, skalt tú venda tær til Kaupthing ella føroysku peningastovnarnar.